## DAGSINS MEINING

# Løgmaður í Bretlandi

Í farnu viku var Anfinn Kallsberg, løgmaður á almennari vitjan í Stórabretlandi. Innbjóðingin frá Tony Blair, forsætisráðharra er skjótt tvey ára gomul. At hon hevur verið útsett fleiri ferðir man uttan iva vera av fleiri orsøkum. Bæði tað at bretskir ráðharrar hava havt so nógv um at vera, og síðani tær drúgvu samráðingar, sum hava verið millum Danmark og Føroyar seinastu árini.

Tað er ikki gerandiskostur, at føroyskur løgmaður er á almennari vitjan í londunum uttan fyri Norðurlond. At leiðin skuldi ganga til Bretlands er heldur ikki so løgið, tá hugsað verður um, at hetta stóra land er okkara næsti granni umframt ein av okkara mest týðandi handilspartnarum.

Undir vitjanini, har løgmaður hitti bæði skotskar og bretskar ráðharrar, var tað serstakliga fiskivinnan, sum varð umrødd og má sigast, at løgmaður fekk umrøtt nógvar týðandi fiskivinnuspurningar við ráðharrarnar. Eitt nú heitti løgmaður á bæði skotar og bretar um at stuðla okkum í ynskinum um at fáa hækkað loftini fyri útflutningi av bæði fiskafóðuri og rækjum til ES. Spurningurin um felags fiskastovnar varð eisini á borðinum, og her mælti løgmaður til, at føroyingar og bretar draga eina línu í ásetanina av svartkjaftakvotu.

Nú ein komandi oljuleiting stendur fyri framman bæði á føroyskum og bretskum øki var tað eisini náttúrligt at taka henda vinnutáttin upp. Bretski orkumálaráðharrin lovaði løgmanni, at teir vildu hjálpa føroyingum, soleiðis at vit kundu byggja upp eina oljuvinnu uttan tey stóru mistøkini teir høvdu gjørt. Her var eisini hugsað um negativu árinini av eini oljuvinnu.

Í hesum sama høpi var eisini spurningurin um ognarrættin til tær stóru leiðirnar sunnan fyri Føroyar og vestan fyri Bretland til umrøðu. Bretski varauttanríkisráðharrin helt fyri, at rætt var um serfrøðingar úr báðum londum settu skjótil á málið, nú ikki færri enn fýra lond gera krav uppá økið. Hann fegnaðist um, at markið innan fyri 200 fjórðingar varð ásett, og metti tað at vera av stórum týdningi fyri framtíðar íløguhugin hjá oljufeløgunum, at eisini markið uttan fyri 200 fjórðingar kom uppá pláss. Undir vitjanini varð eisini skipað fyri móttøku, har umboð fyri føroyskt og bretskt vinnulív, her bæði fiskivinnu- og oljuvinnu, kundu hitta hvør annan. Á tí móttøkuni vórðu fleiri at oddafólkunum í bretskari oljuvinnu.

Samanumtikið varð vitjanin hjá løgmanni í Bretlandi væleydnað og vónandi ein nýggj byrjan í viðurskiftunum millum londini.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

# Alexandur starvsløn í trý ár

**Fyrsta trý ára starvslønin, sum Mentanargrunnur Landsins letur, fer til Alexandur Kristiansen. Í trý ár fer hann at arbeiða við sjónleiki og yrkingum**

MENTAN
*Birgir Kruse*



*Skúlaárið 1997-98 var Alexander Kristiansen vikarur á Kirkju. Her sæst hann á lendingini saman við konuni Karolinu Matras. Í baksýni Másin*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

Týsdagin gjørdi nevndin í Mentunargrunni Landsins av, at Alexandur Kristiansen fær trý ára starvsløn, við støði í reglugerð grunsins. Tvær eitt ára starvslønir vórðu eisini latnar. Onnur fer til Hanus Kamban.

Alexandur Kristiansen er lærari í Fuglafirði og er kendur sum ein av bestu týðarum okkara, tá umrøður yrkingar. Av týðingum kunnu nevnast Lógvalestur í 1996, Anadyomena í 1997 og Veingir, sum kom í fjør.

Sjálvur hevur Alexandur eisini givið út egin yrkingasøvn m.a. Staksteinar í 1990 og Odysseus í hjartanum árið eftir.

Sangbókin Kannubjølluvísur frá 1977 varð útseld beinanvegin og fyrrárið kom fløgan við sangum frá Grísaflísa Pæturi, sum upprunaliga komu út í bók í 1992.

Tá Føroya Lærarafelag, eitt av elstu fakfeløgum í landinum, fylti hundrað, skrivaði Alexandur kantatu til felagið. Pauli í Sandagerði tónsetti og framførslan var í Læraskúlahøllini í oktober 1998. Í bókini, sum lýsir hundrað ára søgu Lærarafelagsins, er teksturin prentaður.

Í stuttum viðtali mikumorgunin sigur Alexandur úr Fuglafjarðar skúla, at hann aldri hevði roknað við hesum. – Væntaði kanska okkurt, sigur hann, Men hetta hevði eg ikki trúð. Eg ætli mær at fáa okkurt skrivligt frá hondini, sigur Alexandur lítillátin. – Sjónleikur og egnar yrkingar, verður tað.

– Lesi beint nú leikin um Nólsoyar Páll, sum Steinbjørn skrivaði til leikritakappingina. Eg ætli at fara longur aftur í tíðina , heilt aftur til Alexandur Mikla. Hann var eitt genialt menniskja, sigur navnin í Fuglafirði. – Uppá ymsar mátar. Hann stuðlaði gransking í gamla Grikkalandi, og tað ætli eg mær í leikinum at binda eitt sindur saman við okkurt í nútíðini. Altso, skifta millum tað heilt gamla og so nútíðna.

Hugskotið til henda sjónleik um Alexandur Mikla fekk eg, tá kapping varð útskrivað nakað herfyri, sigur Alexandur. – Longu tá byrjaði eg at hugsa um at vera við í kappingini, men eg kom aldri so langt og luttók ikki, men hugskotið fekk eg tá, sigur Alexandur.

Eg gjørdist púra ovfarin, sigur Alexandur um boðini, hann týskvøldið fekk frá formanninum í Mentunargrunni Landsins. – Eg havi ikki fata tað ordiliga enn. Og so er hetta eitt ordiligt álit at fáa, skoytir hann uppí úr skúlanum í Fuglafirði, har tey júst nú hava roynd. – Og hetta verður so mín roynd, at royna at liva upp til tað álit, eg havi fingið. Tað havi eg so 3 ár til at prógva.

Rithøvundurin Hanus Kamban fær starvsløn í eitt ár. Hann hevur verið í Danmark eitt skeið og flytir nú heim aftur. Hanus fer fyrst og fremst at skriva um skaldið H. A. Djurhuus.

Umframt Hanus, fær ein annar føroyingur stravsløn í eitt ár. Allar hinar játtaninar eru fyri stytri tíðarskeið, frá hálvum árið til tveir mánaðir.

Tilsamans 37 umsóknir vórðu viðgjørdar á fundinum týsdagin og samlaða upphæddin at lata út varð hálv onnur millión. Mánaðarlønin til tey, sum søkja starvsløn, verður sett eftir læraralønunum í fólkaskúlanum á lønarstigi 21. Henda mánaðarupphæddin er í løtuni 17.876,26. Starvsløn í eitt ár svarar til 214.515,12 kr og starvsløn í 3 ár svarar til 643.545,36.

Søkjast kann um starvsløn frá Mentunargrunni Landsins einaferð um árið. Formaður í grunninum er Rói Patursson og skrivari er Paulivar Andreasen.

Sosialurin ynskir Alexanduri, Hanusi og teimum, sum eisini hava fingið lut í fyrstu starvslønum landins tillukku og góða eydnu.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 348mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.